

# FRÁ LEITANDI FLIPPARA TIL SYNGJANDI **FÓLKAOGN**

FYRI **55** ÁRUM SÍÐAN HEVÐI HANN SÍNA **FYRSTU** KONSERT UPPI Í EINI **SONG**, OG TÁ HANN SUM **15** ÁRA GAMAL FÓR SÍN FYRSTA TÚR TIL **SKIPS**, LÁ HANN FRAMMI UNDIR **BAKKANUM** OG LURTAÐI EFTIR **RADIO LUXEMBOURG**, SO HANN KUNDI **HOYRA** THE BEATLES. Í **DAG** FYLLIR FØROYA **KENDASTI** OG MEST **SERMERKTI** VÍSUSANGARI **60** ÁR. HÓAST HANN HELST **SYNGUR** Í MOLL, ER HANSARA **LÍVSJÁTTANDI** SMÍL ALTÍÐ Í DUR. VIT KAGA Í LÍVIÐ HJÁ **HANUSI G. JOHANSEN**



**LÍVSSØGA**

**Uni Arge**
uniarge@gmail.com

Um so allar fløguhillar verða burturbeindar, og ongin fløga verður eftir at keypa nakrastaðni, verður Hanus G. Johansen ikki gloymdur, tí við tíggjutals fólkakærum sangperlum og eini rødd, ið hevur rúnarbundið hvørt mansbarn í Føroyum í 30 ár, hevur hann ritað sítt navn rimmarfast í føroyska tónleikasøgu. Hvaðani hann fekk røddina, veit hann ikki, men hann er ofta spurdur um hetta, og hann hevur eitt boð. Bóndabrøðurnir í Ánunum, ið hann er skyldur við, vóru sjáldsama góðir sangarar, so kanska kom røddin haðani.

Hanus G. Johansen varð føddur 18. juni í 1950, og tann dagin stóð ikki skrivað uppi yvir Kunoyarfjalli, at hann skuldi gerast Føroya fremsti vísusangari. Áhugin fyri tónleiki í barnaheiminum var tó ikki lítil. Nógv varð sungið, munnharpa var í húsinum, og ein beiggi hansara spældi í hornorkestri. Systirin, Sofía, ið er seks ár eldri enn Hanus, lurtaði nógv eftir Radio Luxembourg, og Hanus fylgdi spentur við, tá hon hvørja viku skrivaði Top 20-listan hjá útvarpsstøðini av fyri at vita, hvør stóð seg best.

Men lívið lagaði seg ikki bara væl hjá Hanusi. Stór sorg rakti húsið í 1963, tá mamma hansara, ið hevði sklerosu, doyði. Skelkurin ávirkaði hann so nógv, at hann gavst í skúlanum tveir mánaðir, áðrenn 7. flokkur var liðugur. Trupulleikin var ikki, at hann onki dugdi, tí hann var millum tey bestu í flokkinum. Hugurin hvarv bara, og so kundi skúli vera skúli. Í dag heldur hann, at hann flýddi inn í tónleikin, og tá hann um sama mundið hoyrdi The Beatles í Radio Luxembourg, var hann seldur.

– Alt hitt kundi pakka saman, tá Beatles kom. Teir høvdu so nógvar góðar sangir og sungu so væl, sigur Hanus G. Johansen og undrast enn á, hvussu nógvur góður tónleikur varð gjørdur í sekstiárunum.

## Lærdi seg at spæla

Meðan beatlarnir hertóku heimin, keypti beiggi Hanus ein guitara og ætlaði at læra seg at spæla. Skjótt slepti beiggin tó guitaranum, men Hanus loftaði honum, og í 1964 lærdi hann seg fyrstu akkordirnar. Ein bók við akkordum var góður vegvísari hjá honum, men enn dugdi hann ongar heilar sangir. Hjálpin var tó í nánd, tí farbróðir hansara, Johan Johansen, var giftur við Miu Waagstein, dóttir Jógvan Waagstein, og hon spældi ofta klaver fyri honum, tá hann var í Havn.

> Fyrsti sangurin, eg bæði spældi og sang, var eitt lag, eg sjálvur hevði gjørt

– Eg kom hjá teimum av og á í samband við Snorra Waagstein Rasmussen. Einaferð spældi Snorri ein sang fyri mær, sum eg helt vera so øgiliga góðan. Á veg aftur til Klaksvíkar royndi eg at minnast, hvat hann hevði spælt, so eg kundi spæla tað sama. Eg gloymdi lagið, men mintist akkordirnar, og fyrsti sangurin, eg bæði spældi og sang, var tí eitt lag, eg sjálvur gjørdi, minnist Hanus.

Tá Hanus í 1965 ognaði sær guitarbókina »50 Hit Songs« við løgum hjá John Lennon og Paul McCartney, var leyst og liðugt, og hann fór at læra seg at spæla sangir. Sama ár fór hann á sild við Polarfarinum. Teir royndu við gørnum og saltaðu sildina upp í tunnur. Við sær umborð hevði hann ein lítlan transistor, so hann kundi sita frammi undir bakkanum og lurta, tá Radio Luxembourg spældi Beatles. Stundum bað skiparin hann skrubba av í koyggjuna, tí hann kundi ikki lurta eftir tónleiki, tá hann skuldi sova, men hann fekk ikki latið vera.

– Árið eftir var eg so við Gulenni. Báðir túrarnir vóru fínasta slag, tí tað var stuttligt at rokast umborð, minnist Hanus, sum seinni eisini var nógvar túrur við línubáti.

## Orkaði ikki at baka

Í 1966 fór hann av landinum. Leiðin gekk til Jútlands, har hann fór á Skabelund Efterskole saman við 80 danskarum og fýra grønlendingum. Árið kundi verið endað sum ein mentanarskelkur fyri tann einsamalla føroyingin, men var ein góð uppliving, tí hann mentist nógv og gjørdist sjálvbjargin. Fyri fyrstu ferð í lívinum fann hann í Danmark útav at skonkja sær ein drekkamunn.

– Sovorðið var ikki nakað, sum